Fyri 35 árum síðani

# Skiparaprógv í 1972



*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór.*

Tíggju næmingar á Føroya Skjómansskúla tóku skiparaprógv í juli 1972, teir vóru: Harry M. Hansen, Egil E. Tofteaard, Fuglafjørður, Sofus Ejler Rubeksen, Tórshavn, Marner J. Danielsen, Strendur, Eyðun Poulsen, Eiði, Rólant Poulsen, Eiði, Jens P.S. Hansen, Vinjard F. Joensen, Tórshavn, Jákup Lassin Nýggjagarð, Hvannasund, og Andreas Gærdum Johansen, Klaksvík, (raðfylgjan er tilvildarlig). Ein næmingur vantar á myndini. Millum næmingarnar á aftara rað er eisini Carl Vang, lærari.

# Grótlaðarin í Hvalba áttati

Sunnudagin fyllir Gudmund Bjarnason Gudmundarson í Hvalba, 80 ár.

Hann er sostatt føddur í 1927 og er sonur Onnu Bjarnason og Jacob Meinhard Poulsen á Skallanum í Hvalba, og hann er elstur av seks systkum.

Í 1951 giftust hann við Petrinu, fødd Johansen, úr Havn og tey búsettust á Skallanum, har tey høvdu bygt. Gudmund og Petrina eiga fimm børn: Herluf, sum doyði longu í 1974, Gudny, Gisla, Øss og Trúgva.

Longu 14 ára gamalur fór Gudmund at arbeiða í kolinum, líka til hann fór at rógva út í Íslandi og arbeiddi á flakavirki í Vestmannaoyggjunum. Í 1960 bygdi Gudmund bátin "Skallabrøðir", saman við bróðrinum, Pól. Báturin varð seldur aftur í 1965.

Í 1966 flutti Gudmund og húski til Havnar, og eftir tað arbeiddi hann í Íslandi í fimm ár og síðani hjá E. Phil & Søn.

Í 1976 fór hann at arbeiða sum sjálvstøðugur grótlaðari og har standa nógvir varðar eftir hann, tí hann



hevur laðað rundanum bæði Lágargarð, SMS, Tryggingina, Dimmalætting og Føroya Banka á Skála, fyri at nevna nøkur av hansara avrikum. Hann hevur eisini laðað Yviri við Strond.

Hann gavst í 1998 og í 2001 flutti hann og Petrina aftur til Hvalbiar at búgva.

Góði pappa: Hjartaliga tillukku á áttati ára degnum. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Børnini


